# Fyrireika nýggja Suðuroyarskipið

*– Størsta kollveltingin verður stytt siglingartíð, betri umstøður hjá ferðafólki og munandi frægari farmaflutnings umstøður, sigur Reidar Nónfjall, stjóri á Strandferðsluni*

EIRIKUR LINDENSKOV

Í gjár bað Strandferðslan fimm skipasmiðjur og projekteringsvirki í Føroyum, Danmark og Noreg um tilboð upp á fyrireikandi projektering upp á nýggja suðuroyarskipið.

– Hetta skal vera grundarlagið hjá okkum, tá vit fara at biða um endalig tilboð upp á bygging av skipinum seinni í ár, sigur Reidar Nónfjall, stjóri á Strandferðsluni.

Hendan fyrireikandi projekteringin skal siga nakað um støddina á skipinum, um kostnaðin at projektera skipið og um tíðarætlanina.

– Hetta tilfarið skulu vit hava aftur innan 18. september. Einar tríggjar vikur seinni skulu vit so gera av, hvør skal projektera skipið. Projekteringsarbeiðið skal verða liðugt innan 14. desember, og fara vit tá at bjóða út arbeiðið, sigur Reidar Nónfjall.

### Hálvanannan tíma til Suðuroyar

Nýggja suðuroyarskipið skal lúka ávís krøv, sum Strandferðslan setur. M. a. skal siglingartíðin styttast.

– Hetta leggja vit sera stóran dent á, sigur Reidar Nónfjall. Vit miða ímóti at siglingartíðin skal styttast við ímillum 30 og 45 minuttir - ella, at siglingartíðin skal taka umleið hálvanannan tíma, sigur hann.

Stórur dentur verður eisini lagdur á, at skipið verður innrættað soleiðis, at pláss verður fyri stórum trailarum og at gott pláss verður á dekkinum til farm. Eisini verður stórur dentur lagdur á komfortina hjá ferðafólkunum, sigur Reidar Nónfjall

Nýggi Smyril verður helst einar 3-4 metrar breiðari og heldur longri, enn dagsins Smyril, sum er 93 metrar langur. Skal skipið ganga skjótari, so er neyðugt, at skipið er longri, sigur Reidar Nónfjall.

– Hetta er ein stór verkætlan, sum nú er farin av bakkastokki, sigur stjórin á Strandfaraskipum Landsins - sum á jólum kann hyggja tilboðini upp á nýggja suðuroyarskipið ígjøgnum.



*Hesi bæði kendu førini fara skjótt í søguna: Nýggja Norröna verður sett í sigling á sumri 2002, og til jóla skulu tilboðini upp á at byggja nýggjan Smyril vera inni*

## Dansur við danska dansiorkestrinum Blue Hawaii



*Teir sum manna bólkin eru Jimmy Albin, guitar og sang, Jesper Harring, trummur og sang, Lars Ploumann, keyboard og sang, Ole Svendsen, bass og sang*

Fríggjakvøldið 25. og leygarkvøldið 26. august verður Badmintonhøllin í Havn karmur um dansitiltak við danska dansiorkestrinum Blue Hawaii.

Tað eru kanska ikki so mong, sum kennast við navnið »Blue Hawaii« . Men seinastu tíðina hevur dansibólkurin úr Skive spælt nógv í Danmark, har teir eru rættuliga væl umtóktir. Teir hava eisini givið út eina fløgu, og tann næsta er á veg.

Øll løgini á fløgunum hava teir skrivað sjálvir. Tónleikurin, teir spæla, er léttur dansitónleikur, serliga ætlaður vaksnum fólki. Tónleikurin hjá teimum kann samanberast við tónleikin hjá Vikingarna, Gluntan, Kandis og aðrir bólkar.

Atgongumerki til dansin fríggjakvøldið og leygarkvøldið í Badmintonhøllini fáa í forsølu í Kunningarstovuni í Havn, Statoilstøðunum í Leirvík, Saltangará, Skálabotni, Sørvági og Gundadali.

Dansurin byrjar bæði kvøldini kl. 23.00.

# Framvegis klorvatn í Havn

*Vatnmongdin úr Villingardali rennur nú vil hálvari ferð oman í býin*

EIRIKUR LINDENSKOV

Klor verður framvegis latið í vatnið í Havn, og tí mugu havnarborgarar framvegis kóka sær vatnið, vilja teir verða á tryggu síðuni.

Hóast vit nú aftur hava havt eitt sindur av regni, so er vatngoymslan í Villingardali framvegis ikki fylt aftur.

Brynjálvur Ellingsgaard á Vatnverkinum í Havn sigur, at nýtt verða eini 80-90 tons av vatni um tíman úr Villingardali. Vanliga nýtslan liggur um 200 tons um tíman.

Men alt tað sum ikki rennur úr Villingardali rennur úr goymsluni í Havnardali.

– Trupulleikin er, at økið í Villingardali, har vatnið rennur í goymsluna, ikki er meira ein ein ferkilometur til víddar - og áskotið er so lítið, at vantið dampar burturaftur. Økið í Havnardali er um tríggjar ferkilometrar - og harafturat eru fleiri keldur, sum renna í goymslu har, sigur Brynjálvur Ellingsgaard.

Teir havnarborgarar, sum búgva niðan fyri ringvegin fáa fyri tað mesta vatn úr Havnardali, men tey sum búgva í Hoyvík og ovaru býarpørtunum fáa reinara vatnið úr Villingardali.

Fer at regna í nakrar dagar, so fyllist vatngoymslan í Villingardali. Men skrúvað verður frá fyrr enn so, sigur Brynjálvur Ellingsgaard.

– Síggja vit, at útlit eru fyri at goymslan økist, skrúva vit frá aftur, sigur hann.

Tað er ikki tað stóra hóvastáki at fáa vatn úr Villingardali kring býin. Nakrir ventilar skulu skrúvast, sigur Brynjávlur Ellingsgaard.



*Økið, har vatnið rennur í vatngoymsluna í Villingardali, er bert ein ferkilometur til víddar, og áskotið tunt. Tí skal regna meira fyri at fylla goymsluna aftur*

# Gjalda ein hægri takst

*– Mær er fortalt, at til dømis við »Dúgvuni« er feraselaprísurin kr. 30, har hava hesi goldið kr. 25, sigur Heini O. Heinesen m.a. í fyrispurningi*

ÓLAVUR Í BEITI

Heini O. Heinesen hevur spurt samferðslumálaráðharran um ferðagjald fyri lesandi, og vil hava at vita, hvussu nógv skulu hesi gjalda, 50% - 75% ella nakað annað, og hvat takstirnir verða í hesum skúlaárinum, sum nú er byrjað?

Í viðmerkingunum, sigur Heini O. Heinesen, at tá spurt verður soleiðis, er tað tí, at ivi hevur tikið seg upp um henda spurning.

– Tey, sum skuldu gjalda 50% eftir tí, sum strandferðslan hevur boðað frá, gjalda í dag ein hægri takst. Mær er fortalt, at til dømis við »Dúgvuni« er ferðaselaprísurin kr. 30, har hava hesi goldið kr. 25, og við bussinum til Havnar er ferðaselaprísurin kr 80, og har hava hesi goldið kr 65, sigur Heini O. Heinesen.

(»Hesi« og »tey«, sum tingmaðurin sipar til í fyrispurninginum, er sjálvsagt tey lesandi, blaðm.)

Á løgtingsfundi týsdagin varð samtykt uttan atkvøðugreisðlu, at fyrispuringurin skal svarast.



# Útoyggjaálitið liðugt til tíðina



*Hálvan november fer útoyggjanevndin at koma við sínum boði upp á ein føroyskan útoyggjapolitikk. Hendan myndan er úr Mykinesi*

*Tað fer ikki at ávirka tíðarætlanina hjá Útoyggjanevndini, at okkurt um helmingurin av svarunum frá stovnum og øðrum ikki kom inn til ásettu tíðina*

EYÐUN KLAKSTEIN

Í gjár hevði Útoyggjanevndin fund, og hóast nevndin kundi staðfesta, at alt tilfarið, sum nevndin hevur biðið um, ikki er komið inn til ásettu tíðina, fer tað ikki at ávirka tíðarætlanina hjá nevndini.

- Vit ælta at hava álitið liðugt til hálvan november, og hóast vit framvegis mangla nakað av tilfari, fer tað ikki at seinkað álitið, sigur Olga Biskopstø, sum er samskipari av arbeiðnum hjá útoyggjanevndini.

Hon hevði sett stovnum og fyritøkum freist til 20. august at koma við frágreiðing um virksemi teirra og ætlanum mótvegis útoyggunum, men tá freistin var farin, manglaði framvegis fitt av hesum tilfari.

- Hetta kemst av summarfrítíðnini. Fólk eru komin aftur til arbeiðis nú, men tað gjørdist ov knapt hjá øllum at náa at svara til ásettu tíðina. Men eg rokni við at fáa restina av tilfarinum í næstu viku, sigur Olga Biskopstø.

### Koma við ítøkiligum hugskotum

Tað var eftir ein fund í Fugloy um støðuna hjá útoyggjunum, sum fekk løgmann at seta eina nevnd at arbeiða við málinum.

Endamálið hjá útoyggjanevndini er at gera uppskot til ein útoyggjapolitikk, sum kann vera við ti at tryggja, at útoyggjunum verður lív lagað.

Útoyggjanevndin fer 15. november at handa løgmanni eitt álit, sum lýsir hvat skal til fyri at skapa virksemi og trivnað á útoyggjunum, sum fleiri eru í vanda fyri at doyggja út.

Arbeiðssetningurin hjá nevndini er at gera ítøkilig menningarhugskot, ið kunnu tryggja virksemi og trivnað á útoyggjunum.

### Heimasíðan hjálpa

Útoyggjanevndin hevur roynt at gera vart við seg, fyri at fáa fólk at senda nevndini hugskot og hugsanir um útoyggjarnar. Nevndin hevur fingið nøkur brøv frá fólki eftir hesar áheitanir.

- Nú hava vit fingið heimasíðuna hjá okkum rættiliga at rigga, og vit vóna, at hon kann geva okkum okkurt. Har kemur vónandi kjak í lag um útoyggjarnar, sigur Olga Biskopstø, samskipari.

Á nevndarfundinum í gjár, skuldi útoyggjanevndin taka støðu til, hvat av tí rúgvismikla tilfarinum skuldi takast við og hvussu umfatandi álitið skal verða.

### Umfatandi tilfar

Ætlanin var at hava ein nevndarfund afturat, áðrenn álitið verður handa mitt í november, men helst verður neyðugt við eykafundi.

- Tilfarið er so umfatandi, at vit verða helst noydd at hava ein eykafund, sigur Olga Biskopstø.

Sambært tíðarætlanini, sum nevndin hevur lagt, skal nevndin fram til 3. oktober savna restina av tilfarinum og hava fundir við stovnar, fyritøkur, bygdaráð og heimildarfólk annars. Endamálið er endaliga at útgreina tey uppskot, sum skulu við í verkætlanina.

Frá 4. oktober til 1. november verður tilfarið skrivað og rættilisið, og hálvan november fær løgmaður so álitið, sum skal verða við til at menna útoyggjarnar.

# Vit skulu gjalda okkara part

**Høgni Hoydal, landsstýrismaður, mælir til, at pengar verða avsettir til arbeiðið í Norðurlandaráðnum á fíggjarlógini fyri komandi ár**

EYÐUN KLAKSTEIN

Stendur tað til Høgna Hoydal, landsstýrismann, fara Føroyar í framtíðini at gjalda sín part av virkseminum hjá Norðurlandaráðnum.

– Vit mugu koma burtur frá tí,at vit bara skulu fáa og ikki skulu gjalda, sigur Høgni Hoydal.

Hann ætlar at syrgja fyri, at pengar verða avsettir á fíggjarlógini fyri 2001, og so er bara eftir hjá føroyingum at sleppa at gjalda.

Í blaðnum í gjár søgdu føroysku umboðini í Norðurlandaráðnum, at tey hildu tað verða óverdugt, at føroyingar ikki gjalda sín lutfalsliga part av virkseminum hjá Norðurlandaráðnum.

Tað eru danir, sum gjalda fyri føroysku umboðini í Norðurlandaráðnum, tí danir hava avsett tveir parlamentariskar sessir til føroysk umboð ókeypis.

### Danir vilja ikki

Dan Reinert Petersen, annar av føroysku limunum í Norðurlandaráðnum, førdi í Sosialinum í gjár fram, at tað kennist snópisligt at leggja uppskot fyri Norðurlandaráðið, tá føroyingar als einki gjalda fyri virksemið hjá ráðnum.

Jógvan við Keldu, sum er hin limurin, segði í gjár, at tað eigur at vera eitt prinsippmál, at føroyingar at gjalda sín part av virkseminum hjá Norðurlandaráðnum.

Hesum er Høgni Hoydal, landsstýrismaður, samdur í ,men hann sigur, at hóast føroyingar í langa tíð hava ynskt at gjalda sín part, sum er millum eina og tvær milliónir krónur, hevur tað ikki borið til.

- Hini norðurlondini hava sagt, at hetta er eitt mál millum Føroyar og Danmark, og danir hava ikki viljað latið okkum goldið okkara, sigur Høgni Hoydal.

### Ikki givið úrslit

Høgni Hoydal sigur, at hann og aðrir landsstýrismenn undan honum hava víst á, at Føroyar eiga at gjalda sín lutfalsliga part til Norðurlandaráðið, men at hetta ikki hevur givið nakað úrslit enn.



*- Vit mugu koma burtur frá tí,at vit bara skulu fáa og ikki skulu gjalda, sigur Høgni Hoydal, landsstýrismaður, um føroysku støðuna í Norðurlandaráðnum*

- Eg ætli mær eisini at endurtaka hetta, tá ársfundurin hjá Norðurlandaráðnum verður í Reykjavík í november, sigur hann.

Bert sjálvstøðug lond kunnu verða limir í Norðurlandaráðnum, og tí eru Føroyar eitt slag av limi umvegis Danmark, sum eisini pungar út fyri okkum.

- Hetta er ein spurningur um hálvaðru millión, sum vit eiga at gjalda, og fyrsta stigið er at seta pengar av á fíggjarlógini. Tað fari eg mæla til á komandi fíggj-


